# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Hetta er ein týðandi dagur, ikki bara fyri Norðurírland, men alt Bretland*

*(Tony Blair)*

# Tað ótrúliga hendi







**Bara tey fægstu høvdu ímyndað sær, at erkafíggindarnir í Norðurírlandi kundu semjast um at skipa stjórn saman. Men tað bar til**

Ian Paisley og Gerry Adams, erkafíggindar í mong ár, høvdu fingið greið boð úr London, áðrenn teir fóru á fund í gjár.

- Kemur eingin semja í dag um at skipa felags stjórn, verður norðurírska tingið upployst, og Norðurírland verður aftur stýrt beinleiðis hiðani, vóru greiðu boðini frá Tony Blair, forsætisráðharra.

Hetta var ikki fyrstu ferð, at Paisley og Adams høvdu fingið kravboð úr London, men hesaferð hendi tað óvæntaða, at teir samdust um at gera eftir boðunum. Eygleiðarar halda, at tað var trýst frá tí vanliga fólkinum í Norðurírlandi, sum fekk teir báðar at semjast.

- Eftir drúgva umhugsan eru vit komin til hesa niðurstøðuna, segði Ian Paisley aftan á fundin við Gerry Adams, sum segði, at hetta var tað málið, sum flokkur hansara, Sinn Fein, altíð hevði havt.

Alt bendir á, at Ian Paisley verður leiðari fyri teirri komandi stjórnini. Hann fær heiti sum fyrstiráðharri, og næsti maður hansara verður ein av teimum mest royndu politikarunum hjá Sinn Fein, Martin McGuinnes.

**Strævin framtíð**

-Tað ótrúliga er hent, men partarnir hava eina trupla tíð fyri framman, sigur professarin Rick Wilford, sum er serkønur í norðurírskum viðurskiftum, við NTB. Hann væntar ikki tað nógva samskiftið millum ráðharrarnar hjá teimum báðum pørtunum, men at embætismenninir fara at ganga við boðum teirra millum. Aðrir eygleiðarar vísa á, at tær víðgongdu kreftirnar hjá báðum pørtum fara ivaleyst at halda fram við teirra virksemi, og at tær kunnu framvegis gera stóran skaða.

Tony Blair var sjónliga fegin um boðini úr Belfast.

- Hetta er ein týðandi dagur - ikki bara fyri fólkið í Norðurírlandi, men fyri alt Bretland og tess søgu, segði Blair. Írski starvsbróður hansara, Bertie Ahern, var eisini fegin um semjuna og mælti pørtunum til at brúka ta komandi tíðina væl.

# Krevur Berlusconi í fongsul

***Ákæruvaldið í Milano vil hava fyrrverandi forsætisráðharran dømdan í fongsul fyri svik***

Ákæruvaldið vil vera við, at Silvio Berlusconi var sekur, tá hann í áttatiárunum var í rættinum fyri svik, men at hann bleiv fríkendur, tí hann rindaði dómaranum mutur.

Málið var aftur í rættinum í 2004. Eisini ta ferðina bleiv Berlusconi fríkendur. Men ákæruvaldið í Milano sigur, at dómurin í 2004 er ikki eftirfarandi, tí tá var Berlusconi italskur forsætisráðharri. Í fjør tapti Berlusconi tjóðartingsvalið og noyddist frá, men áðrenn hann legði frá sær, fekk hann tingið at samtykkja eina lóg, sum skuldi forða ákæruvaldinum at taka gomul mál ímóti sær uppaftur.

Men italski hægstirættur hevur sett lógina til viks, og tí kann ákæruvaldið nú aftur krevja hann dømdan.



*Silvio Berlusconi*

## STUTT SAGT

## Herboð

Í Zimbabwe hevur Robert Mugabe, forseti, gjørt av at se3nda boð eftir eldri hermonnum, sum gjørdu tænastu í landsins frælsisbardaga. Sambært boðunum skulu teir gomlu hermenninir gera tænastu í serligum deildum, sum verða lagdar saman við stjórnarherinum. Zimbabwiski stjórnarherurin telur 40.000 mans, men tað er óvist, hvussu nógvir av teimum gomlu hermonnunum hava fingið boð um at møta til tænastu. Eygleiðarar í Zimbabwe siga, at boðini hjá forsetanum kunnu hava samband við ta spentu støðuna millum forsetan og andstøðuna. Tað er eisini komið fram, at nógvir stuðlar hjá forsetanum eru ímóti ætlan hansara at stilla uppaftur næsta ár.

## Ognartekur jørð

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, hevur gjørt av, at tað almenna skal ognartaka fleiri av teimum stóru bóndagørðunum, sum góðseigarar eiga. Fyribils hevur hann givið herinum boð um at taka ræðið á 20 stórum bóndagørðum, og hann hevur longu sagt, at fleiri skulu ognartakast afturat. Hugo Chavez sigur, at hann hevur gjørt av at ognartaka jørðina, tí góðseigararnir dyrka hana ikki, og nú ætlar hann at lata smábøndur fáa jørðina til djórahald. Fyribils hevur herurin tikið 330.000 hektarar av landbúnaðarjørð í fimm landspørtum, skrivar AP.

## Illir fílar

Tveir bretskir ferðamenn, sum vóru farnir eina ferð í einari djóralund í Zimbabwe leygardagin, doyðu, tá ein fílur bráðliga legði á teir. Ein triði ferðamaður skal við lívinum. Myndugleikarnir í Zimbabwe siga, teir tríggir ferðamenninir hava ikki verið nóg ansnir, men teir siga eisini, at eitt fílaálop kann koma ógvuliga bráðliga. Tað hendir meiri enn so, at fílar gera seg inn á ferðafólk í djóralundunum í Zimbabwe, og tað eru bara krokodillurnar, sum eru vandameiri fyri fólk enn fílarnir. Í 2005 kravdu fílaálop 12 mannalív í Zimbabwe.